Dagf. 18. mai 2021
HMR J. nr. 21/07820-3

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-141/2020 eftir § 52a í tingskipanini um viðgerð fyri barnloysi, frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingskvinnu

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin grundgeva fyri, hví rundskriv nr. 9000 frá 2004 um stevnumið viðvíkjandi viðgerð móti barnloysi varð sett úr gildi í september í fjør?
2. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvørjar reglur eru galdandi fyri tey, ið ynskja at sleppa í viðgerð fyri barnloysi?

Til spurning 1 og 2

Í dag eru ongar formligar leiðreglur galdandi, tá ið tað viðvíkur viðgerð móti barnloysi. Talan er um eina viðgerð í sjúkrahúsverkinum og tí kann vísast til galdandi sjúkrahúslóg.

Umfarsskrivið, sum viðvíkti viðgerð móti barnloysi, var sett í gildi tann 1. mai 2003, men var sett úr gildi aftur á heysti 2006 av tásitandi landsstýrismanni. Av misgáum er umfarsskrivið síðani lagt á heimasíðuni logir.fo. Feilurin varð rættaður í september í fjør. Orsøkin, til at umfarsskrivið varð sett úr gildi í 2006, var, at tað løgfrøðiliga ikki var mett rætt at nýta eitt umfarsskriv sum grundarlag fyri avgerðum, um hvør hevði rætt til viðgerð móti barnloysi, men at hetta í staðin skuldi ásetast við lóg.

Síðani tá er tað politiskt ikki lagt nakað lógaruppskot fyri Løgtingið, men sjúkrahúsverkið hevur umsitið økið sambært praksis á økinum, og hevur fíggjað upp til tvey felags børn fyri barnleys pør.

Landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at fara í Løgtingið komandi tingsetu við einum lógaruppskoti, sum viðvíkur viðgerð móti barnloysi.

Heilsumálaráðið, 18. mai 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður